Skemt



# Stakkals Parker

Leiðslan í enska felagnum West Ham hevur sett allar spælarar í felagnum til sølu – uttan ein. Ídni miðvallarin Scott Parker er ikki á sølulistanum, men allir liðfelagarnir hjá honum kunnu verða seldir, um rætti prísurin fæst fyri teir. Jamen, tað verður strævið hjá Scott Parker at spæla einsamallur á liðnum hjá West Ham næsta kappingarár. Men okay, tað kann ikki ganga nógv verri enn í ár. Og tað kann eisini verða, at Scott Parker fær 25 nýggjar liðfelagar – spurningurin er, hvussu hugaligt tað verður.



## Hvar er **veðrurin**?

Tað eigur at ganga eitt stykki errin veðrur onkrastaðni á Skálafjørðinum. Seinastu dagarnar hava vit frætt um eina ær, sum hevur lembt sjey smálomb. Hetta líkist einum heimsmeti, verður sagt. Vit hava sæð myndirnar av teimum fittu lombunum og stoltu ærini. Men hvar er veðrurin, sum hevði søguliga plettskotið? Hann má verða nakað errin av sínum avriki, og spurningurin er, um hann ikki var verdur eina samrøðu.

*- Tú, **Martin**, passar tað, at tú skalt skiljast fyri fimtu ferð?*

- Ja, tað passar.

*- Og hvat, er tað tú ella konurnar, sum hava skyldina av tí.*

- Tað er í øllum førum ikki mín skyld, tí tað eru altíð tær, sum biða um at verða skildar.

## Í RANGASTRÚPAN

**Roknimeistari**
Hetta merkir so eisini, at Sambandsflokkurin hevði fingið 11 tinglimir, ella tríggjar afturat teimum sjey, teir hava í dag.
***Portal.fo***

**Uppsagnir allastaðni**
Ellisakfør koyrdu flaggdagin
***Portal.fo***

**Nei, hann spældi fótbólt!**
Gunnar skrivaði søgu leygardagin
***Dimma***

**Ella hamarin hjá Tór...**
Gosøksa hóttir aftur føroyskt loftrúm
***Portal.fo***

**Máti við klókheit**
Eg veit gott, at tað eru nøkur fólk, sum halda at tað er rein skandala, at allir føroyingar ikki duga øll fýra ørindini í tjóðsanginum.
***Agga Niclasen í Eygsjón***

**Hervið lýsa vit brúkarveitsluna at byrja**
284 milliónir í frítíðarløn
***Portal.fo***

**Mjau!**
400 ára gomul ketta funnin
***Portal.fo***

**No shit, Sherlock!**
Nógvur ísur í Arktis
***Portal.fo***

**Øskan farin víðari**
Ísland er reinast
***Portal.fo***

**Álvaratos!**
Føroyingar vilja sjálvandi hava, at landsliðið kann spæla í bæði VM og HM
***Verturin í Álvaratos***

**Nikotindálking**
Ein russiskur trolari fekk um vikuskiftið bót uppá 178.000 krónur frá TAKS
***Dimma***

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Flagga lágt

Klárar tú at langa gestum tínum eitt glas, við onkrum í sjálvandi, í hondina, áðrenn 30 sekund eru farin frá tí, tey komu, ert tú ein góð vertinna ella ein góður vertur.

Tað sigur heimskenda pengamaskinan Jamie Oliver, sum byrjaði sum kokkur.

Í Føroyum eru vit tí væl fyri, fyri ikki at siga framúr væl fyri, í hesari ítróttini. Her hjá okkum fáa gestirnir glasið í hondina í sama sekundinum, tey koma. Tey fáa durasnapsin.

Ein óføra góður siður og einasta veruliga positiva heimsmetið, vit eiga.

Jú, men latið okkum so flagga fyri tí. Kanska var tað eisini fyri tí, vit flaggaðu seinasta sunnudag. Spell, at tað júst hendan eina dagin kuldi vera logn, so fløggini ikki sóust, og mjørki, so fløggini ikki sóust.

Tí vit hava nógv at flagga fyri, ikki bara durasnapsinum og sekundinum.

Vit flagga, tí at okkara kirkja er hvørki pedofil ella stupid.

Vit flagga, tí at hóast heilir samfelagsbólkar havi ikki ráð at keypa mat, er eingin deyður í hungri. Vit flagga, tí at tey fátæku kunnu ikki rýma úr paradísi. Tey hava ikki ráð til ferðaseðilin. Og einki mark er fyri armóðini.

Vit flagga fyri okkara dugnaligu, avgjørdu og støðuføstu politikarum, sum vinna veljarakanningar.

Vit flagga fyri tí sosiala rættvísi, at landskassin rindar tríggjar pakkar av blæum um mánaðin fyri pápar í útlegd, og at brøðralagspápar í útlegd uttangarðs hava nossir til at forða fyri, at hetta verður broytt.

Vit flagga fyri teimum stórpseudotíðindum, at á einum stiga frá 1 til 10 halda 5,6 reyðhærdar kvinnur 60+ í Suðuroynni, sum ikki vildu svara, at løgmaður klárar seg væl.

Vit flagga fyri fjórða statsvaldinum, sum so dyggiliga tekur í herðatoppin á hinum trimum statsvaldunum við kritiskum avdúkingum, sum svíða, og lata undirhaldsídnaðin eiga undirhaldið í friði.

Vit flagga (og skála í alkoholfríum durasnapsi) fyri teimum, sum turrisliga verja okkum móti sterkum øli.

Vit flagga fyri álitinum hjá Fótbóltssambandinum á landsliðið og eykajáttanini, sum tað sjálvmálið kostaði.

Vit flagga fyri teimum, sum eru so mentað og lisin, at tey vilja stýra landinum eftir einari gamlari bók og ikki eftir tí órógvandi syndafulla veruleikanum.

Vit flagga ikki minst, tí at vit, fólkið í Føroyum, eru serstøk tjóð við okkara egna samleika og alt hatta har, sum skjótt hevur sína serstøku grundlóg, sama hvat hasir skiti danskararnir og løgfrøðingarnir siga. Við lóg, einari lóg, grundlógini, og ikki fleiri øðrum óviðkomandi lógum, skal land byggja.

Vit flagga fyri teimum, sum verja málið í 22 minuttir. Tey, sum hava vart málið og roynt at hildið tí reint í 22 ár og mangt slíkt, fáa verri enn so allar hasar forsíðurnar.

Vit flagga fyri veðurlagsbroytingum, so ikki er frost flaggdagin.

Vit flagga, tí vit eiga eitt flagg, sum er okkara einasti herfongur.

Vit flagga, tí at motorlíggin ikki kappaði tvey prosent av hvørjari flaggstong og hvørjari flagglínu.

Vit flagga 1.mai, tí stættarstríðið fánaði burtur, og láglønt eru enn sum fyrr láglønt.

Vit flagga, tí at Miðflokkurin hevur avdúkað, at ávís fjølmiðlafólk sleppa at brúka almennar miðlar til miðvíst at bera fram persónlig sjónarmið og áhugamál.

Við flagga – á hálvari stong. Tað loysir seg ongantíð at gera ov nógv av. Máti skal vera við øllum, eisini fyri sjálvflagging.

Har fóru 30 sekund og einki glas. Pengamaskinan hevði so nógv at siga, at hann gloymdi glasið.